# Litirnir umboða felagskenslu

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður, helt flaggrøðu í Vági flaggdagin og nógv fólk var komið saman í góðveðrinum. Hvørt tað var ein suðuroyingur, ein tvøramaður ella løgmaður, sum helt røðuna, bað Jóannes Eidesgaard lurtaran sjálvan meta um. Røðan tók støði í smálutunum, sum tó eru partur av alheiminum og sum skapa felagsskapin, tjóðina**

FLAGGRØÐA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Litirnir í Merkinum umboða eina felagskenslu, ið eisini minnir á stóru løturnar og kenslurnar gera okkum til eina tjóð, segði løgmaður millum annað í flaggrøðu síni í Vági flaggdagin*

Í góðveðrinum flaggdagin høvdu nógv fólk leitað sær til flaggdagshald í Vági. Haldið var sum vant við minnisvarðan. Annars var haldið fyrr á Fløtuni Fríðu, har Nólsoyar Páll í sínari tíð bygdi Royndina Fríðu og í ár eru 200 ár síðani hesa hending.

At tað í ár var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ið helt flaggrøðuna, lokkaði óivað eisini áhoyrarar.

Løgmaður helt góða og viðkomandi røðu og hann bað lurtaran sjálvan meta, hvørt tað var løgmaður, ein suðuroyingur ella ein tvøramaður, ið helt røðuna. Litirnir í Merkinum umboða eina felagskenslu, ið eisini minnir á stóru løturnar og kenslurnar gera okkum til eina tjóð, segði løgmaður.

Men hann hugleiddi eisini um tað smáa í tí stóra, um heildina og samansetta lív okkara. Øll eru vit partar av størri heild og tó partar av smærri eindum og so kann ein samanbera byrjan løgmans, sum jú er suðuroyingur og tvøramaður, umfram løgmaður.

Vit eru øll partar av ymsum felagsskapum, skótar hoyra til ymsar patruljur, vit hoyra til ymisk ítróttarfeløg og so framvegis, men tað byrjar í nærumhvørvinum, segði løgmaður millum annað og bendi sostatt hugan aftur á stóru felagskensluna, ið savnast undir Merkinum, og ger okkum til part av tjóðini.

### Syðra helvt ikki við í framburði

Løgmaður staðfesti, at júst Vágur og syðra helvt av Suðuroynni, ikki hevur fingið lut í framburðinum, sum verið hevur seinnu árini. Men tá kreppan herjaði, fekk hesin parturin av landinum tó sín ríkiliga lut.

Tó hava betri tíðir verið á staðnum. 200 ár eru síðani Nólsoyar Páll bygdi far sítt Royndina Fríðu og gingu vágbingar á odda eftir hetta í framburðinum á mongum økjum her á landi.

Men ikki ber til at bíða eftir nýggjum einstaklingum og úrmælingum, segði løgmaður. Fólkið skapar framtíðina í felag og tað at bíða loysir sum heild onki. Initiativið skal koma herfrá, minti løgmaður á í røðu síni í Vági.

Men øskukalt er ikki í Vági, segði løgmaður, og nevndi eina rúgvu av tiltøkum, serliga innan mentan, sum til dømis Kirkjukóri Ljóm og sendingar í ÚF, har vágbingar eiga sín stóra part.

Umboðandi landspolitikkin metti løgmaður, at uppgávan er at skapa syðru helvt av oynni javnbjóðis treytir at virka undir og so er eisini umráðandi, at tey ungu trívast og hava okkurt at koma aftur til, um tey leita burtur at royna seg, segði løgmaður Jóannes Eidesgaard millum annað í flaggrøðu síni í Vági.

Ljómur setti sum vant dám á løtuna við frálíkum sangi. Skótaliðið Royndin skipar fyri haldinum og í samband við, at 200 ár eru síðani at Nólsoyar Páll bygdi far sítt, bjóðaði skótaliðið kaffi og køkur í skótahúsinum. Skótaliðið hevur navn eftir fari Nólsoyar Páls.

# Stór kvøldskúlaframsýning

**Kvøldskúlaframsýningin í Porkeri er afturvendandi tiltak og er sýningin væl vitjað, tí nógv væl úr hondum greitt er at síggja**

FRAMSÝNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Sunnudagin var árliga kvøldskúlaframsýningin í Porkeri. Nógv er at síggja, tí 70 fólk hava í vetur tikið lut í tí, ið kvøldskúlin hevur at bjóða av ítrivum. Har er hondarbeiði, seyming, træsmíð, modelsmíð og tvey lið í postalínsmáling.

Og tað sást, at hugurin og hegni eru til staðar. Vakrir modelbátar, har eisini øll arbeiðsgongdin er at síggja, ymisk timburarbeiði, klæði og vakurt málað postalín.

Lærarar eru Irena Remmer, postalínsmáling, Sonja Fredriksen, hondarbeiði, Anna A. Poulsen, seyming, træsmíð og modelsmíð, Mannbjørn Olsen og Bent Albinus.



*Sunnudagin var árliga kvøldskúlaframsýningin í Porkeri. Nógv er at síggja, tí 70 fólk hava í vetur tikið lut í tí, ið kvøldskúlin hevur at bjóða av ítrivum*

## Fjølmiðlakeldulisti til kvinnur

Á kvinnuráðstevnuni, sum URD skipaði fyri farna vikuskifti, kom millum annað fram, at kvinnur mangla á keldulistunum hjá fjølmiðlafólki. Nú ber til hjá kvinnum at skráseta seg á ein keldulista á heimasíðuni hjá Synergi. Felagið hevur gjørt eina síðu á teirra heimasíðu, har kvinnur kunnu seta seg á ein keldulista. Hesin keldulistin verður síðani sendur tíðindaleiðarunum í fjølmiðlunum.

– Kvinnur hava, eins og menn, kompetancur innan nógv ymisk viðurskiftið. Vit mæla tí øllum teimum kvinnum, sum hava áhugað í at gera sína ávirkan galdandi gjøgnum fjølmiðlaheimin, um at tekna seg á keldulistan, verður sagt frá Synergi, sum eisini luttók á kvinnuráðstevnuni.

Heimasíðan hjá Synergi er: www.synergi.fo

**- sae -**



# Insest-offur fáa ráðgevingarstovu

**Hans Eiler Hammer, prestur og Jógvan Mortensen, pedagogur, fara í næstum at seta á stovn eina ráðgevingarstovu fyri fólk, sum hava verið fyri insest ella siðamisbroti**

RÁÐGEVINGARSTOVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Annar er prestur, hin pedagogur. Báðir vóru teir við til at stovna felagið, Kris. Teir vóru aktivir í felagnum øll tey fyrstu árini, men við tíðini gjørdist byrðan ov stór og tíðarkrevjandi. Nú taka teir eina 4-árs terapiútbúgving í Danmark, har teir læra at ráðgeva fólki, sum á ymiskan hátt hava verið fyri siðamisbroti. Ein stórur partur av útbúgvingini er sjálvlesnaður, og ætla teir báðir at verða lidnir við útbugvingina um nøkulunda somu tíð.

- Hetta er ein altjóða góðkend útbúgving, sum byggir á kristiligt grundstøði.

### Ráðgevingarstova

Hans Eiler Hammer sigur, at saman við útbúgvingini krevst, at teir báðir veita ráðgeving eitt ávíst tímatal, meðan teir lesa.

- Vit fara tískil at skipa eina ráðgevingarstovu, sum tó ikki fer at hava eitt fast sæti. Í fyrsta lagi fara vit at læna hølir í Klaksvík og í Havn, har fólk kunnu fáa ráðgeving. Vit fara eisini at hava eitt telefonnummar, sum fólk kunnu ringja til.

Hans Eiler leggur dent á, at ráðgevingarstovan tekur ikki upp kappingina við felagið, Kris, men fer at verða supplerandi.

- Kris er eitt felag, sum verður stjórnað av eini landsnevnd. Ráðgevingarstovan hjá okkum verður privat og fer at veita persónliga ráðgeving og møguliga skipa fyri onkrum fyrilestrum og skeiðum.

Prestur sigur, at hann og Jógvan í eini 2-3 ár hava vegleitt, ráðgivið og stuðlað fólki og familjum teirra, sum hava verið fyri siðamisbroti.

- Hóast vit ikki hava lýst við, at vit ráðgeva, fáa vit nógvar fyrispurningar um hesi viðurskifti – eisini frá fólki, vit ikki hava tosað við áður um slíkt.

### Lænt hølir

Hans Eiler sigur, at fólk, sum halda seg hava tørv á ráðgeving og vegleiðing, kunnu seta seg í samband við ráðgevingarstovuna, tá ið hendan er sett á stovn.

- Vit fara at lýsa við hesi tænastu, tá ið alt er komið uppá pláss, og vit eru til reiðar at fara í gongd, sigur presturin.

Hann vísir á, at stovan fer ikki av sær sjálvari at skipa fyri teimum nógvu fyrilestrunum og skeiðunum, men fólk eru vælkomin at koma við góðum hugskotum.

- Í fyrst lagi fara vit at leggja dent á persónliga viðtalu, sigur Hans Eiler.

Jógvan Mortensen, sum fer at taka sær av ráðgevingarstovuni saman við Hans Eileri, hevur arbeitt nógv við menningartarnaðum børnum, og í sínum arbeiði sum pedagogur er hann eisini nógv knýttur at barnaverndini í Klaksvíkar kommunu.

### 10% av fólkinum

Hans Eiler sigur, at leystliga verður mett, at í minsta lagi 10% av fólkatalinum á ein ella annan hátt hava verið rakt av siðamisbroti.

- Tað tekur oftast langa tíð, áðrenn fólk siga sína søgu um siðamisbrot. Ikki er óvanligt, at hetta hendir um 20-25 ára aldur, tá ið tey, sum hava verið rakt, sjálvi eru farin at byggja upp eina familju. Tá stinga ofta trupulleikar seg upp, og fólk fara at spyrja seg sjálvi, hvat hetta, tey vóru úti fyri, var fyri nakað.

Hans Eiler Hammer sigur at enda, at tað ofta er ótti fyri ti, sum fer at henda, ið heldur fólki aftur - ella sum ger, at tey bíða sum longst við at siga nakað um tað, ið fram er farið, meðan tey enn vóru børn.



*- Tað tekur oftast langa tíð, áðrenn fólk siga sína søgu um siðamisbrot. Ikki er óvanligt, at hetta hendir um 20-25 ára aldur, tá ið tey, sum hava verið rakt, sjálvi eru farin at byggja upp eina familju. Tá stinga ofta trupulleikar seg upp, og fólk fara at spyrja seg sjálvi, hvat hetta, tey vóru úti fyri, var fyri nakað, sigur Hans Eiler Hammer, sum saman við Jógvani Mortensen fer at lata upp eina ráðgevingarstovu*

# Luna og Bakkafrost seta smolt út á Gøtuvík

**- Gøtuvík hevur ligið brak, síðan ILA-sjúka varð staðfest á víkini, men nú kann smolt setast útaftur, sigur Atli Gregersen, stjóri í P/F Luna**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í hesum døgum seta alifeløgini, Luna og Bakkafrost, smolt út á Gøtuvík. Luna hevur smoltini gangandi undir syðra landinum og Bakkafrost undir norðrara landinum*

*Savnsmynd*

Í hesum døgum seta alifeløgini, Luna og Bakkafrost, smolt út á Gøtuvík. Luna hevur smoltini gangandi undir syðra landinum og Bakkafrost undir norðara landinum.

Atli Gregersen, stjóri í p/F Luna, vil ikki siga í løtuni, hvussu nógv smolt, felagið setir út í hesum umfari, men sigur, at vit kunnu venda aftur til spurningin, tá ið teir eru lidnir at seta út.

### 3 miljónir smolt

Hann vísir á, at samlaða nøgdin av smolti, sum verður sett út í Føroyum í vár, liggur um 3 miljónir.

Í mun til nøgdina í fjør og fyrraárið, er hetta eitt lutfalsliga lítið tal.

Í 2002 settu føroyingar eini 20 miljónir smolt út, og í fjør lá talið um 7 miljónir.

Atli Gregersen sigur, at alifeløgini, sum seta smolt út í ár, eru 5-6 í tali.

Gøtuvík hevur annars ligið brak, síðan ILA-sjúka varð staðfest á víkini, men nú kann smolt so setast útaftur.

Luna og Bakkafrost eru einastu feløgini, sum seta smolt út á Gøtuvík í vár.

### Tøma Lambavík

Í fjør vár settu Bakkafrost og Luna smolt út á Lambavík, men hóast ILA-sjúka ikki er staðfest, verður Lambavík seinni í ár tømd fyri fisk.

- Vit hava fingið eina nýggja kunngerð sum sigur, at aliøkir skulu tømast og liggja uttan fisk í minsta lagi tveir mánaðir. Hetta er fyri at minka um vandan fyri bakterium og ein roynd at fyribyrgja sjúkum, sigur Atli Gregersen, stjóri í P/F Luna.